# ðarin er nú aftur skipaeigari

### 4-5 mans við

Ólavur Petersen sigur, at eingin av manningini, sum er umborð á Gáshøvda í dag, fylgir við skipinum til Sørvágs, og soleiðis fer P/F Húsadalur at finna fólk til skipið, nú tað skiftir heimstað.

– Einir 4-5 mans verða við Gáshøvda, sum nú í summar trolar á landleiðini.

Maðurin, sum aftur er vorðin reiðari og skipaeigari, sigur, at felagið enn ikki hevur hugsað um, hvussu og hvar fiskurin, sum skipið kemur at føra til lands, verður seldur.

– Men tað fer at koma, leggur hann aftrat.

Umframt virkini í Vágum, er eisini Landingarmiðstøð í Sørvági.

### Gleðir seg

– Jú, hetta verður spennandi, og eg gleði meg rættiliga at fara undir vinnuligt virksemi aftur.

Spurdur, um hugsandi er, at P/F Húsadalur fer at keypa fleiri skip, sigur Ólavur:

– Tað dugi eg ikki at siga í løtuni. Beint nú stendur fyri framman at fáa hetta virksemið í gongd, sigur fyrrverandi reiðarin og stjórin í P/F Vesturvón.

Hann hevur góðar vónir um, at raksturin hjá Gáshøvda fer at bera seg.

– Hetta er eitt nýtt skip, sum brúkar lutfalsliga lítla olju. Fiskidagarnir eru ikki so nógvir, men møguleiki er eitt nú at keypa dagarnar frá partrolarum, sum kunnu umroknast til okkara dagar, sigur Ólavur Petersen.

Partarnir eru samdir um ikki at upplýsa prísin fyri trolbátin.




*– Eg havi alla tíðina ætlað mær í gongd aftur, síðan virksemið hjá P/F Vesturvón í Sørvági helt uppat, sigur Ólavur Petersen, fyrrverandi stjóri og reiðari í P/F Vesturvón síðan 1988*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Føroyabanka er hættislig

gera okkurt munagott fyri at minka um veiðitrýstið.

Í sínum tilmæli kemur Fiskidaganevndin ikki við uppskotum um tillagingar í lógini um vinnuligan fiskiskap, tí ein nevnd arbeiðir í løtuni við spurninginum um, hvussu vinnuligur fiskiskapur skal skipast í framtíðini.

Óli Samró er formaður í Fiskidaganevndini og skrivari er Hetha Olsen.

Nevndin, sum hevur havt fimm fundir, hevur annars síni umboð úr vinnuni.

### Føroyabanki

– Vit ásanna, at okkurt munagott skal gerast fyri at verja toskin á Føroyabanka, tí ov nógv trýst er á veiðini. Vit mæla til at skerja dagatalið og veiðina á Bankanum. Somuleiðis mæla vit til, at friðingin í gýtingartíðini heldur fram.

Fiskidaganevndin heldur, at eftirlitið við veiðini á Føroyabanka eigur at verða styrkt.

– Vit mæla til neyvari eftirlit við veiðini hjá føroyskum eins og útlendskum skipum – serliga hjá trolarum, sigur nevndin í sínum tilmæli.

Nevndin heldur, at støðan hjá toskinum á Føroyabanka er hættislig, sum tikið verður til.

– Tí mugu munagóð tiltøk setast í verk fyri at skerja veiðina á Bankanum.

### Støðan hin sama

Fiskidaganevndin hevur fyri hvønn veiðibólk sær viðgjørt veiðina eftir toski, hýsu, upsa, longu, brosmu, havtasku og flatfiski. Nevndin hevur eisini viðgjørt, hvussu fiskiskapurin sær út í nøgd, stødd, og hvussu fiskurin er fyri. Mett hevur eisini verið, hvussu støðan er við æti.

– Sum heild meta vit støðuna hjá fiskastovnunum fyri øll fiskasløgini at vera sera líka støðuni seinasta ár. Minni er framvegis til av toski, men veiðinøgdin av toski er fyri hvønn bólk sær í fiskidagaskipanini nøkulunda tann sama í ár sum seinasta ár, sigur Fiskidaganevndin í sínum tilmæli.

### Djúpvatnstrolarar

– Vit fara ikki at endurtaka okkara tilmæli seinastu árini. Tó vilja vit endurtaka okkara tilmæli um at fáa djúpvatnstrolararnar og garnaskipini við inn í fiskidagaskipanina.

Nevndin heldur, at fiskidagaskipanin skal fevna um alla botnfiskaveiði á føroyskum øki, og nevndin heldur eisini, at serliga toska-og hýsukvotan hjá lemmatrolarum eigur at takast av.

– Sum nakað nýtt, mæla vit til, at ein serlig dagaskipan verður sett í verk fyri djúpvatnstrolarar og garnaskip. Hendan skipan skal roynast uttanfyri vanligu dagaskipanina í nøkur ár.

Fiskidaganevndin heldur, at fylgjast skal væl við, hvussu skipanin virkar – og eftir eina greitt avmarkaða royndartíð, eiga eisini hesi skipini at koma inn í fiskidagaskipanina.

### Skipanin hótt

– Atlit eiga at verða tikin til tann niðurskurð, sum hevur verið í fiskidagaskipanini síðan byrjan.

Nevndin heldur, at sjálvt grundarlagið í fiskidagaskipanini er hótt, tá ið týðandi veiða á sama avmarkaða øki er skipað eftir fleiri skipanum, sum Fiskidaganevndin tekur til í sínum tilmæli.



*Sum nakað nýtt, mælir Fiskidaganevndin til, at ein serlig dagaskipan verður sett í verk fyri djúpvatnstrolarar og garnaskip*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*